# Skjálvtar í Íslandi

Gjáranáttina var ein veikur jarðskjálvti í Íslandi. Skjálvtin, sum bleiv máldur til 3,0 á Richter-stiganum, var við Krísuvík, og sambært jarðfrøðingunum var miðdepilin einar fimm kilometrar undir jørð við vatnið Kleifarvatn. Seinni vóru tveir veikir eftitrskjálvtar á somu leið. Hóast meginskjálvtin var bara trý stig, varnaðust fólk í Hafnarfirði og har um vegir skjálvtan. Nevnast kann, at Kleifarvatn og Krísuvík eru ikki langt frá tí kenda Bláa Lóninum.



*Økið við Reykjanes er jatrðskjálvtaøki Kort: Morgunblaðið)*

# Hvalur ferðavinnumál

Grønlendskir fiskimenn vilja hava myndugleikarnar at tynna eitt sindur út í kúlubøkustovninum, tí hvalurin etur nógvan fisk og oyðileggur reiðskap. Men hesum tekur ferðavinnan ikki undir við. Finn Siegstad hjá World of Greenland sigur við KNR, at fremmand ferðafólk vilja sleppa at síggja hval. Um summarið verður skipað fyri bátaferðum við fólki, sum vilja sleppa at síggja livandi hval, sum tí er eitt gott íkast fyri ferðavinnuna.



*- Føroyingar eru ikki so útfarandi sum danir, teir snakka ikki so nógv og spyrja heldur ikki eins nógvar spurningar sum ein vanligur dani*

*- Tað er partur av mínum arbeiði, at fáa skipan og starvsfólk at skilja, at tað er ikki tað sama, um sjúklingurin kemur frá Østerbro ella úr Føroyum*

*- Eg vildi í øllum førum treyðugt verið ein gomul gomul kona úr Svínoy, sum verður send til sjúkrahús í Aberdeen*

*- Tað eru nógvar tungar lagnur. Fólk fáa at vita, at einki kann gerast. Tað er ómenniskjaligt at fáa at vita slíkt einsamallur langt heimanifrá*

- Sjúklingaviðgerð er meira enn bara ein skurðviðgerð. Í Keypmannahavn hava vit føroyskan sjúklingavegleiðara, føroyskt hotel, føroyskan sosial ráðgeva og eitt føroyskt útiseta umhvørvið. Og tað er heilt avgjørt ein styrki, metir Elionora Olsen.

Hóast hon fegnast um góða føroyskt-danska samstarvið, so eru eisini økir, sum kunnu bøtast.

- Mangan koma føroysku sjúklingarnir niður uttan eina viðgerðarætlan. Tá henda skal gerast her, verður sjúklingurin noyddur at vera longri niðri. Tá talan er um vanliga sjúkraviðgerð, kundi ætlanin verði løgd longu í Føroyum.

Og tá sjúklingurin er liðugur við donsku viðgerðina, kann tað eisini halta við at samskipa uppafturvenjing í Føroyum.

- Síðani eg bleiv sjúklingavegleiðari hava vit fingið skipað tað soleiðis, at allir sjúklingar, sum koma niður at fáa bypass ella klapp, verða sendir heimaftur í gjøgnum Landssjúkrahúsið, har teir eru innlagdir í eitt døgn. Fyrr fóru hesir sjúklingar beinleiðis heim til sín sjálvs, og tá var skjótt til, at føroyska uppfylgingin ikki var nøktandi, greiðir føroyski sjúklingavegleiðarin frá.

## Harðar lagnur

Elionora Olsen vónar, at samskipanin millum føroysku og donsku skipanina kann gerast enn betur, og hon sær eisini ein stóran tørv á at styrkja um sjúklin gavegleiðarafunktiónina.

- Nú verður danska heilsuverkið umskipað, so alt høvuðsstaðarøki verður lagt saman. Sum er, kundi eg brúkt alla mína tíð til skrivligt arbeiði, men persónligu vitjanirnar eru týdningarmiklar, og tá Gentofte, Glostrup og Bispebjerg eisini verða partur av arbeiðsøkinum er torført at síggja, at ein persónur kann gera alt.

Harumframt metir hon at tørvur er á einum føroyskum sálarfrøðingi í tilknýti til føroyska sjúklingaumhvørvið antin á Ríkissjúkrahúsinum ella á Hotel Tórahavn.

- Tað eru nógvar tungar lagnur. Fólk fáa at vita, at einki kann gerast. Tað er ómenniskjaligt at fáa at vita slíkt einsamallur langt heimanifrá, og eg eri ofta við til slíkar samrøður.

- Tað er eisini hart at vera avvarandi. Tey skulu stuðla og eggja, samstundis sum tey eru líka kedd sum tann sjúki. Ofta hava vit lindið til bara at síggja sjúklingin og ikki tørvin hjá tí avvarðandi, men tey hava mangan tørv á sálarligari hjálp, staðfestir Elionora Olsen, vegleiðari hjá føroyskum sjúklingum á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn. Hon vónar, at føroyska sjúklingavegleiðara funtiónin á Ríkissjúkrahúsin heldur fram og verður styrkt.